# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 19. juni 2012, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Evelyn Gaard, Jón Mikkelsen, Bárður Poulsen og Siri S. Niclassen.
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Bárður Poulsen í telefonsamrøðu tann 19. juni 2012 frá, at honum berst frá møta á fundinum, og at tiltakslimur fær fundarboð í hansara stað.

Tiltakslimurin Øssur Christiansen fekk fundarboð í telefonsamrøðu tann 19. juni 2012.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Øssur Christiansen sum tiltakslim.

Borgarstjórin kunnaði um, at síðani skráin varð løgd, er eitt mál komið avtrat: umsókn um stuðul til koyring av børnum til og frá fótbóltsvenjing. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um loyvi at seta málið á skránna sum mál 85.
Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti.

**Mál 80**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Maju Nielsen um sundurbýti av matr. nr. 264a.
J.nr. 2009-475

Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 80**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 81**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Herit Joensen um lendi buturav ogn kommununnar matr. nr. 266a afturfyri at taka “Villa Højsted” niður. Talan er um uml. 107 $m^2$.
J.nr. 2005-261

**Viðv. 81**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 19. juni 2012, kl. $19^{00}$.

**Mál 82**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini í sambandi við bygdarráðssamtykt um at stuðla Fjarðastevnuni og Dansibandsfestivalinum við 20.000 kr., umframt arbeiðshjálp o.a. í sambandi við tiltøkini. Síðani tá hevur VÍF avgjørt ikki at hava Dansibandsfestivalin í ár.
J. nr. 2009-430

Fíggjarnevndin tók á fundi 12. juni 2012 málið uppaftur til viðgerð, Bárður Poulsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Karl A. Olsen og Pauli T. Petersen mæla til at staðfesta játtaða stuðulin á 20.000 kr. umframt arbeiðshjálp o.a. í sambandi við stevnuna.

**Viðv. 82**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 83**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um avskriving av skuld hjá P/F Vestmanna Fiskavirki. Talan er um lendisleigu í tíðarskeiðnum 01.07.2009 til 01.04.2011.
J.nr. 2009-480

Nevndin mælir til at avskriva upphæddina á 88.875 kr. í lendisleigu.

**Viðv. 83**
Síðani skráin varð send bygdarráðslimunum, eru upplýsingar komnar um, at upphæddin ikki er dagførd; rætta upphæddin er 118.500 kr. Karl A. Olsen, borgarstjóri, mælir til at avskriva rættaðu upphæddina á 118.500 kr. í lendisleigu.

Tilmælið varð einmælt samtykt.

Í sambandi við viðgerðina av máli 84 fór Øssur Christiansen av fundinum.

**Mál 85**
Umsókn frá 07 Vestur um stuðul til koyring/fótbóltsvenjing av ungum.

**Viðv. 85**
Karl. A. Olsen, borgarstjóri, mælti til at samtykkja at stuðla koyringini við 10.000 kr. í 2012, og samstundis at heita á 07 Vestur um at tryggja, at øll børn sleppa við í bussinum til og frá venjing.

Øssur Christiansen komin aftur á fundin.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.15.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen

Evelyn Gaard Jón Mikkelsen Øssur Christiansen Siri S. Niclassen